

# Skráin hjá Rás2

Send heilsanir til Ynskiløtuna á www.ras2.fo ella SMSa á 52 00 00

## Hósdagur 7. jan.

15:00 Tíðindi
15:05 Rockballadir
16:00 Tíðindi
16:05 Bilradio – Magnus Gunnarsson skipar fyri
17:00 Tíðindi
17:20 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:50 Tónleikur
00:00 Liðugt

RÁS ...títt radio

## Fríggjadagur 8. jan.

07:00 Tónleikur
09:00 Morgunsending – Heri Simonsen skipar fyri.
11:00 Tíðindi
11:15 Morgunsending /Firmakapping Føroya Koyrilærarafelag og Biofar í Kaldbak kappast
12:00 Tíðindi
12:15 Hittónleikur
13:00 Ynskiløtan
15:00 Tíðindi
15:10 Varpið – Heri Simonsen leggur til rættis
16:00 Tíðindi
16:05 Varpið – Heri Simonsen leggur til rættis
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:50 Tónleikur
00:00 Liðugt

## Leygardagur 9. jan.

07:00 Tónleikur
10:00 Brot úr vikuni
17:00 Bilradio
19:00 Playlistar
00:00 Liðugt

## Sunnudagur 10. jan.

07:00 Tónleikur
12:30 Á Torginum (e)
14:00 Tónleikur
15:00 Bilradio – Magnus Gunnarsson leggur til rættis
16:00 Tónleikur
21:00 Við kelduvaðið – Jógvan Skýlindal leggur til rættis.
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

## Bilradio
### í dag kl. 16.05

Í sendingini er m.a. prát við Eivind av Reyni frá Reyni Service um Toyota, sum bleiv mest selda bilmerki í 2009. Vitjað verður á Vøruhúsinum á Hjalla, har m.a. verður prátað við Sámal Olsen og við Sofus Hansen, sum luttók á einum skeiði fyri lakkerarar. Í sambandi við at nýggi Opel Astra verður presenteraður leygardagin, verður ein samrøða við Heðin Weihe, sølumann hjá Auto Service. Eisini er prát við Magnus Magnussen, verkfrøðing hjá SEV, um Citröen C1 elbilar.

Sendingin verður endursend leygardagin kl. 17.



Magnus Magnussen við einum av elbilunum hjá SEV



Vinningurin í S&S hesaferð:

# Familjupakki til Summar Festivalin

Í S&S kanst tú nú vinna ein familjupakka til Summar Festivalin 2010. Føroya størsti festivalur verður hildin í Klaksvík í døgunum frá 5. til 7. august, og á pallinum verða kend útlendsk og føroysk nøvn.

Hetta er sjendu ferð, at Summar Festivalurin verður hildin, og tiltakið hevur í fleiri ár verið tað størsta av sínum slagi í landinum. Aftur í ár verður lagt upp til ein stóran festival við spennandi tónleikabólkum, sum fara at undirhalda í tríggjar dagar.

Í S&S kanst tú vinna fýra vikuskiftispass – tvey til vaksin og tvey til børn

Fyri at vera við í kappingini, skalt tú senda SMS-boðini »SoS« til 1940 (prísurin er 30 kr. fyri hvørt sms).

Lutakast verður millum øll tey, sum hava sent inn, og tey, ið sleppa við í sendingina, skulu svara 10 spurningum í almennari vitan. Tvær ferðir kanst tú fáa hjálp at svara. Klárar tú ígjøgnum spurnarkappingina, er vinningurin tín.

Summar FESTIVALUR